# Kunningarskriv tilætlað læknum og læknaskrivarum, viðvíkjandi ordinatión av forskriftaheilivági í Cosmic

*Hetta kunningarskriv verður sent til tykkum við tí endamáli at minka um óneyðuga bíðitíð hjá kundum okkara. Samstundis ynkja vit at fremja sjúklingatrygdina, og vænta, at færri feilir verða gjørdir í samband við útflýggjan av forskriftaheilivági, um nevnda mannagongdin verður nýtt.*

Heitt verður á tykkum, sum skriva og undirskriva forskriftir, vinarliga at nýta hesar mannagongdir:

1) Nýtið talgilda e-forskrift í staðin fyri hondskrivaðar og fax-forskriftir.

2) Nýtið altíð **"Anden information"**, og <u>ikki</u> doserings- og indikatiónsfeltið, um viðmerkingar eru til ordinatiónina. Nevnast kunnu hesi dømir:

    (a) Sendast (verður sent til bústað sambært Landsfólkayvirlitinum, um annað ikki er viðmerkt)
    (b) Heintast
    (c) Gjaldast/fakturerast til ávísa deild á LS (bert læknar á LS kunnu fakturera til LS)
    (d) Frítt carnitin, hetta tí at støða skal takast til talið hvørja ferð pivmecillinam verður útskrivað

   Verða doserings- ella indikatiónsfeltini nýtt í staðin fyri, so hanga hesir gomlu upplýsingar við um forskriftin verður endurnýggjað. Hesir gomlu upplýsingar skapa ivamál hjá okkum, og vit verða noydd at seta okkum í samband við viðtalur og sjúkrahús. "Anden information" harafturímóti, er bert tengt at tí útskrivaðu forskriftini.

3) Skal sjúklingurin hava **fleiri sløg** av heilivági, so kann heilivágurin við fyrimuni útskrivast á **somu** forskrift, hetta minkar munandi um arbeiðsbyrðuna á apotekunum. Tó undantikið turvelvandi heilivágur (AP4).

4) Heilivágur við útflýggjanarkotu AP4, A, NBS ella BEGR kann sambært lóg bert **útflýggjast 1 ferð** á somu forskrift. Her er talan um m.a. turvelvandi heilivág og serstakan sjúkrahúsheilivág. Útflyggjanarkotan sæst á pro.medicin.dk. Skipanin hjá okkum broytir í øllum hesum førum talið á forskriftini til 1 útflýggjan.

5) Um sjúklingur skal hava **klausulerað tilskot** til ávísan heilivág, so skal hetta viðmerkjast í Cosmic.

6) Um heilivágur **ikki skal býtast um** til bíligasta samheitaheilivág, so skal lækni velja "ingen substitution" í Cosmic.

Vinarliga | Tjaldurs Apotek | Novembur 2018